## Larvik avhøvdaði FCK

Uttan at hava spælt, er danska FCK úti av Champions League-kappingini í kvinnuhondbólti. Skuldi FCK koma víðari, skuldi norska Larvik vinna sín útidyst ímóti russiska HC Dinamo. Men av tí at Larvik longu var komið víðari, møtti liðið upp til dystin við bara sjey útispælarum, og sjálvt venjarin var ikki farin við. Tað merkti, at norska liðið ikki megnaði at halda allan vegin, men dragnaði ímóti endanum og tapti við trimum málum. Tí er líkamikið, hvussu síðsti dysturin hjá FCK ímóti montegrinska Budocnost endar.



## »Høsnarungin« liðugur

Danski súkklarin, Michael Rasmussen, sum í 2007 var tveittur úr Tour de France-kappingini, beint áðrenn hann vann hana, verður av fleiri mettur at vera liðugur sum toppsúkklari. Michael Rasmussen, sum er 36 ára gamal, hevur júst skrivað undir sáttmála við lítla italska felagið, Miche. Súkkluserfrøðingurin hjá danska ríkisvarpinum, Alex Pedersen, væntar ikki, at »Høsnarungin«, sum hann verður róptur, aftur verður at síggja í nakrari av stóru kappingunum.

# Birita setti juniormet og vann seniorgull

**Føroysku svimjararnir fingu um vikuskiftið hópin av góðum úrslitum í stóru íslendsku svimji-kappingini, Reykjavík International Games 2010. Eitt tað flottasta avrikið var, tá Birita Debes í gjár setti føroyskt juniormet, samstundis sum hon vann gull í seniorkapping**

Tað var í 50 metra ryggsvimjing, at



Hilmar Jan Hansen

Birita Debes megnaði at fáa bæði upp í posa og sekk, umframt at hon eisini vann silvur í 200 metra ryggsvimjing – í báðum førum hjá seniorum. Sostatt fekk Birita staðfest, at vit óivað koma at síggja meira til hana í framtíðini.

Eisini Turið S. Christiansen gjørdi vart við seg, tá hon í seniorkappingini í 100 metra bringusvimjing vann silvur, samstundis sum hon setti nýtt juniormet. Og tað sama var hjá Monku Biskopstø, sum vann bronsu í 400 metra frísvimjing hjá seniorum við nýggjum føroyskum juniormeti.

Samlaða heiðursmerkjaúrtøkan gjørdist eisini góð í Reykjavík International Games, tí føroysku svimjararnir koma heimaftur við 11 gull-, 20 silvur- og 12 bronsuheiðursmerkjum, harav eitt gull-, fýra silvur- og tvey bronsumerki vóru vunnin í seniorkapping.

Harumframt eydnaðist eisini at seta met í hópatali, og tilsamans gjørdist hesa ferð talan um trý føroysk met og 12 juniormet, men haraftrat skal so eisini sigast, at allarflestu svimjarar settu somuleiðis persónlig met.

### Øðrvísi upphiting

Tað er eftirhondini blivin fastur siður, at Svimjisambandið sendir svimjarar til Reykjavík International Games, men hesa ferð var upphitingin eitt sindur øðrvísi, enn hon plagar at vera.

Í ár hevði Svimjisambandið 16 ungdómssvimjarar á venjingarlegu í Reykjavík í eina viku undan stevnuni, eins og bæði Ægir og Suðuroyar Svimjifelag hava verið har yviri við 10 svimjarum.

Og hóast kappingin er av á hesum sinni, koma ikki allir svimjararnir heimaftur beinanvegin, tí átta svimjarar úr Havnar Svimjifelag fara nú víðari til Akureyrar, har teir skulu vera á venjingarlegu í 50 metra hyli líka til 25. januar.

At svimjararnir soleiðis sleppa at venja seg við øðrvísi umstøður bæði undan og eftir kapping, boðar vónandi frá góðum undan komandi kappingum, tí ofta góðar fyrireikingar eru ikki so sjáldan gull verdar – bókstaviliga!




**Føroysku svimjararnir fóru til Íslands eina viku undan kappingini, og nakrir svimjarar verða nú eftir í Íslandi alla ta komandi vikuna**
Mynd: Øssur Mohr




**Birita Debes ovast á sigurspallinum, millum tveir íslendskar svimjarar, eftir at hon vann gull í seniorkapping, samstundis sum hon setti juniormet**
Mynd: Øssur Mohr